




TACC 2008

## Gilli Trond hevur sett fimm punktir upp, sum greiða frá um fyrimunin við at brúka tara sum bio-brennievni:

1. Tari er ein fototropur. Tað vil siga, at hann inngongur í natúrligu ringrásina í mun til Co2 inntøku og útlát. Hetta er eisini fortreytin fyri at rópa hetta slagið av orkukeldu fyri bio-framleiðslu ella burðardygga framleiðslu.
2. Tari veksur millum fimm og tíggju ferðir skjótari enn tilsvarandi landplantur. Sostatt er talan um nógv størri framleiðslu.
3. Umleið 50 prosent av turrevninum í tara er sukurevni. Tí er tað so ómetaliga vælegnað til ethalnolframleiðslu.
4. Tari er ikki ein høvuðsføðikelda. Tí koma vit ikki í etiskar trupulleikar við at nýta matvørur til orku. Eitt sum umhvørvisfelagsskapir hava mótmælt. Í løtuni verður mais og sukurrør brúkt til ethanol.
5. Talen er um havframleiðslu, og tí eru vit ikki í kapping um jørðina, bústaðir, landbúnað og fríøki.
6. Tari fær føðsluevnini frá havstreymi, so framleiðslan hevur ikki tørv á taðing, hvørki natúliga ella kunsttøð.

*Hetta kann gerast eitt oljuævintýr fyri landið, bara ikki við undirgrundini*